# Afrikanskar rútmur á Musikkskúlanum

**Í hesi vikuni skipar Tórshavnar Musikkskúli fyri einum rættiliga óvanligum og forkunnugum tiltaki, har næmingarnir fáa høvi at læra seg at spæla á afrikanskar trummur. Til endamálið hava teir fingið Bass Njai úr Gambia at læra frá sær**

TÓNLEIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Bass Njai er 40 ára gamal, ættaður úr Gambia og býr í Danmark. Hann er tónleikalærari og hevur vitjað í Føroyum fimm ferðir áður, og hevur hann millum annað spælt saman við Kára Sverrisson, Gestir, Clickhaze og seinast á ársins G! Festivali saman við Eivør.

Nú vitjar Bass aftur í Føroyum, men hesaferð kemur hann ikki at spæla tónleik, men til at læra frá sær. Tórshavnar Musikkskúli skipar í hesi vikuni fyri, at næmingar og áhugaði fáa møguleikan at læra seg at spæla afrikanskar trummur – trummurnar, sum Bass kallar fyri djembe.

Undirvísingin byrjar í kvøld og heldur áfram til sunnudagin. Komandi viku fer Bass til Klaksvíkar, har hann fer at læra frá sær í Virkishúsinum.

Bo Isholm er leiðari á Tórshavnar Musikkskúla, og hann sigur, at vaksandi áhugin fyri heimstónleiki er høvuðsorsøkin til at teir hava fingið Bass Njai higar at undirvísa.

– Vit fingu møguleikan at keypa nakrar trummur av einum verkstaði í Gana, og tað gjørdu vit so, og síðani hava vit fingið Bass Njai at læra okkum at spæla upp á tær, sigur Bo Isholm.

Leiðarin á Tórshavnar Musikkskúla vísir eisini á, at musikkskúlin oftani er settur í samband við klassiskan tónleik, men at tey við hesum eisini vilja vísa á, at tað væl er pláss fyri tí rútmiska tónleikinum eisini.

Bass Njai sigur seg vóna, at nógv koma at læra seg at spæla afrikanskar trummur, og hann sigur eisini, at um áhugi er fyri at ogna sær eina slíkar, so ber til at bíleggja tær frá honum.



*Komandi tvær vikurnar fer Bass Njai úr Gana at læra føroyingar at spæla upp á afrikanskar trummur*
*Mynd Jens Kr. Vang*





A.P. Møller - Mærsk A/S holder ansættelsessamtaler for kvalificerede og interesserede skibsofficerer den 4. og 5. oktober i Torshavn.

**Hos A.P. Møller - Mærsk A/S søger vi løbende veluddannede og erfarne skibsofficerer, og vi opfordrer derfor interesserede ansøgere til at søge ansættelse i Rederiets flåde.**

Som skibsofficer hos A.P. Møller - Mærsk A/S får du adgang til et spændende lederjob i et af verdens største og mest ansete rederier og en karriere, der udfordrer både dine faglige og menneskelige evner. Alt sammen med fokus på detaljen – grundlaget for den pålidelighed, der tegner Rederiets profil.

Vi lægger vægt på, at vores skibsofficerer er motiverede, engagerede og påtager sig et stort ansvar. Det er desuden væsentligt, at du har en god og bred erfaring inden for søfart.

Du tilbydes en attraktiv løn, lange sammenhængende ferieperioder og gode udviklingsmuligheder via arbejdet og vores efteruddannelse. Du bliver en del af et særligt fællesskab om bord på en sejlende arbejdsplads.

Vi besøger Torshavn den 4. og 5. oktober, så du skal have mulighed for at komme til samtale på dette tidspunkt. Har du lyst til at søge nye udfordringer som skibsofficer hos A.P. Møller - Mærsk A/S så send os en ansøgning samt dit CV senest den 22. september 2006 pr. e-mail på: tomarrec@maersk.com eller pr. post til:

**A.P. Møller - Mærsk A/S**
**Teknisk Organisation**
**Skibspersonnel / Marine HR**
**Esplanaden 50**
**1098 København K**
**Danmark**

MÆRSK






## Handilslærlingur

**Vit sóknast eftir lærlingi til HVS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8**

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv:**
FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

**Vit vænta at tú ert:**
Røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hettar er eingin treyt.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, fríggjadagin 15. september 2006.

Eru spurningar, eru tygum altíð vælkomin at ringja á tel 31 20 00

**pf Maria Poulsen**
BOX 182 · FO-110 TÓRSHAVN

Sosialurin 341800